# BYRSUMAÐUR ONGARI BYRSU

**AVBYRGING** – Sjálvandi tóku vit fráboðanina í álvara um, at maður hevði hótt við at skaða seg sjálvan. Vit fóru til verka í royndini at byrgja uppfyri, at nakað hendi. Men hendingin í Funningsfirði týskvøldið gjørdist einki mál, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn

Vilmund Jacobsen

Seint týsdagin gjørdist mikil rokan í Funningsfirði, og bygdin varð avbyrgd eina fitta løtu.

Løgregla við lummalyktum og hundum og sjúkrabilur komu til bygdina. Fólk, sum ætlaðu sær gjøgnum bygdina í bili, vórðu steðgað og onkur, sum ætlaði sær til Gjáar eftir Funningsvegnum, slapp ikki inn í bygdina, men noyddist longu leiðina um Eiðisskarð.

Tá fólk í Funningsfirði sóu alt hetta hóvastákið í bygdini og spurdu seg fyri, fingu tey at vita, at tey skuldu ikki fara út um, tí vápnaður maður var í bygdini.

Fleiri sótu hesar tímarnar við læstari hurð.

## Var einki mál

Tað tók sína tíð, til løgreglan umsíðir kundi boða frá, at umrøddi maður var handtikin, og at hann hvørki hevði gjørt skaða á seg sjálvan ella onnur. Maðurin hevði ikki byrsu hjá sær, tá hann var handtikin.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur í morgun, at tey fingu eina fráboðan frá fólki, sum standa manninum nær, um, at hesin hevði hótt við at skaða seg sjálvan.

Hann sigur, at alt kortini spældi væl av, og tað vísti seg, at tá samanum kom, at hetta var einki mál.

## Einki kriminelt

Løgreglan sigur, at sjálvandi tóku tey fráboðanina úr Funningsfirði í álvara í royndini at byrgja uppfyri, at nakað hendi.

– Tí fóru vit at leita í Funningsfirði týskvøldið. Maðurin bar einki skotvápn, sjálvt um hann sambært onkrum av nærmastu hevði hótt við at skaða seg sjálvan.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur í morgun, at einki kriminelt var við hendingini ella í aðrar mátar við manninum í Funningsfirði týskvøldið.

vilmund@sosialurin.fo




# Kongshavn landað seks partrolarar

**VIRKSEMI** Landingarmiðstøðin Kongshavn, sum er dóttirfelag hjá Faroe Seafood, er framvegis virkin, og fólk eru ikki søgd úr starvi

Vilmund Jacobsen

Síðan Faroe Seafood herfyri endaði í Skiftirættinum, og hópur av fólki vórðu søgd úr starvi, er framvegis virksemi á landingamiðstøðini Kongshavn í Saltangará.

Tey, sum starvast hjá Kongshavn, eru ikki søgd úr starvi.

Talið av arbeiðsfólki, sum starvast hjá landingarmiðstøðini, hevur táttað í 30, tá ið mest hevur verið at gera.

## Seks landingar

Landingarmiðstøðin hevur landað tilsamans seks ísfiskatrolarar seinastu vikuna.

Týsdagin fyri góðari viku síðan landaðu partrolararnir, Jaspis og Ametyst, stívliga 140.000 pund.

Seinasta hósdag landaðu partrolararnir, Heykur og Falkur og seinasta fríggjadag eisini partrolararnir, Polarhav og Stjørnan.

Á landingarmiðstøðini siga tey, at bæði pørini høvdu umleið 170.000 pund hvørt parið.

At kalla øll veiðan hjá partrolarunum er upsi.

vilmund@sosialurin.fo




*Jaspis og Ametyst, sum eru millum skipini, ið seinastu vikuna hava landað í Saltangará*
Mynd: Vilmund Jacobsen